Bjørg Hentze

Fra: Majbritt Lamhauge <Majbrittl@vorn.fo>
Sendt: 16. marts 2023 12:00
Til: Bjørg Hentze
Cc: Jóhan Simonsen; Hannus Petersen
Emne: Hoyringar - Uppskot til broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)

Fíggjarmálaráðið

Víst verður til hoyring um uppskot til broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin).

Við hesum verður sagt frá, at Vørn einans hevur fylgjandi viðmerkingar til uppskotið:

Til § 1:
Núverandi skipan, har tað einans verður goldið veiðigjald av norðhavssild, hevur í fleiri førum verið orsøk til grundaðan illgruna um, at fiskifør uppgeva veiðuna sum heystgýtandi sild, hóast fiskaða nøgdin er norðhavssild.
Við hesum uppskoti slepst undan hesum illgruna, og umsitingin verður munandi lættari hjá Vørn.

Til § 2:
Núverðandi orðingin í § 2 í veiðigjaldslógini hevur verið orsøk til tulkingarósemju millum Vørn og eigarar av fiskiførum í fiskidagaskipanini, hvørt tað er kvotaslagið ella eigarin av fiskifari, sum er avgerðandi fyri hvørt veiðigjald skal áleggjast t.d. menningarkvotum.
Við hesum uppskoti verður henda tulkingarósemjan ikki longur viðkomandi, og umsitingin av veiðigjøldum verður munandi lættari hjá Vørn.

Vinarliga / Best Regards

Majbritt Lamhauge
Løgfrøðingur / Legal Adviser
Faroe Islands Fisheries Inspection
Tlf.: +298 291011
mailto:majbrittl@vorn.fo

Fra: Bjørg Hentze <Bjorg@fmr.fo>
Sendt: hósdagur, 9. mars 2023 16:31
Til: Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; kf@kf.fo; Journal <Journal@vorn.fo>; stefan@industry.fo; notaskip@notaskip.fo
Cc: Djóni Højgaard <Djoni@fmr.fo>
Emne: Hoyringar - Uppskot til broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)

Góðan dagin,

Viðheft er uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin). Fíggjarmálaráðið hevur í dag sent uppskotið í almenna hoyring.

Ummælisfreistin er tann 16. mars 2023. Møguligar viðmerkingar skulu sendast til fmr@fmr.fo í seinasta lagi 16. mars 2023 kl. 12.

Vinarliga / Kind regards

Bjørg Hentze
Samskipari / Coordinator
Office: +298 352020
Mobile: +298 552006
bjorg@fmr.fo

FØROYA LANDSSTÝRI
The Government of the Faroe Islands

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance
Tinganes / FO-100 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 352020 / fmr@fmr.fo / www.fmr.fo